skapinum, sum má ganga fram um møguligan løtuvinning og stuttskygdar loysnir.

Serliga eru tað seinastu orðini, sum tykjast vísa til stríðið um milliónina.

Síðani hevur Petur Elias Petersen í samrøðu við Dimmalætting sagt, at hann ikki orkaði meir og hugurin var burtur. Tað er tó nærliggjandi at hugsa, at ósemja spældi sín stóra leiklut, tí fáa dagar seinni segði Sølvi Reinert Hansen nakað tað saman, tá hann legði frá sær sum nevndarlimur.

Sostatt er nevndin heldur ikki viðtøkufør fyrr enn eftir aðalfundin í kvøld.

Elin Heðinsdóttir Joensen komandi forseti

Tey 13 sersambondini í »samgonguni«, hava stillað Elina Heðinsdóttir Joensen upp til ÍSF forseta. Hon er forkvinna í Fimleikasambandinum og verður eftir øllum at døma nýggjur forseti í ÍSF í kvøld.

Andstøðan ynskti at stilla Kaj Leo H. Johannesen upp, men hann ynskti bara at taka við forsetasessinum um tað var uttan stríðsval.

So skulu veljast fýra limir í starvsnevndina, harav tveir skulu veljast fyri fýra ár og tveir fyri tvey ár.

Tey 13 skjóta upp at velja Schandorff Vang og Sigurð Rasmussen fyri fýra ár, og Heðin Joensen og John Kjær fyri tvey ár.

Tey trý sersambondini hava skotið Gunnar Djurhuus og Jon Hestoy upp til tvey ára skeiðið, men hava ongan skotið upp, ið skal sita í nevndini í fýra ár.

Ymisk argument

Kjakið snýr seg í stóran mun um, at samgongan heldur at andstøðan tekur ov nógv til sín, og í fleiri førum verður vístá, at játtanin faktist verður hækkað til eitt nú flogbóltssambandið.

Argumentið úr andstøðuni er, at nýggi býtislykilin ikki leggur upp til at menna altjóða arbeiði og luttøku.

Hvat er og ikki skal verða ósagt her, men tað er greitt at ÍSF skal hava nýggjan forseta og starvsnevnd, umframt at tað er ein møguleiki fyri, at ÍSF ikki verður samlandi felagsskapurin hjá føroyskum ítrótti eftir aðalfundin í kvøld.

TRONDUR@SOSIALURIN.FO

Sølvi Reinert Hansen velur sum tann triði í røðini at leggja starvsnevndarsessin í ÍSF frá sær í úrtíð. - Tað er eitt frítíðarítriv, sum alt annað, og eg tímdi ikki meiri. Tað er tað, sigur Sølvi Reinert Hansen við In.fo

– Trettan sersamband eru saman um uppskotið, ið er latið ÍSF. Eg haldi tað er ein týdningarmikil uppgáva at savna ÍSF aftur, sigur Elin H. Joensen við In.fo.

Magnus Tausen, formaður í Flogbóltssambandinum, sigur í samrøðu við Rás2, at tað er avgjørt ein møguleiki fyri, at flogbólturin tekur seg úr ÍSF felagskapinum, tá tað ikki longur er ein fyrimunur at vera við.

15. APRÍL: Magnus Tausen, formaður í Flogbóltssambandinum, sigur í samrøði við Vikuskiftis Sosialin, at tað var einki ynski frá andstøðuni um at fáa Petur Elias Petersen frá.

21. APRÍL:

13. MAI: Tey 13 sersambondini standa saman um at stilla forkvinnuna í Fimleikasambandinum, Elina Heðinsdóttir Joensen, upp til ÍSF forseta. Einki mótvalevni er, so alt bendir á, at ÍSF fær sín fyrsta kvinnuliga forseta.

13. MAI:

14. MAI: Formaðurin í Svimjisambandinum, Rókur í Jákupsstovu, leggur í tíðindaskrivi eftir teimum 13 sersambondunum fyri at útihýsa andstøðuna. Millum annað verða tey ikki boðin til fund, tá nýtt forsetavalevni verður valt.

18. MAI:

Kunning vegna Svimjisamband Føroya

Undirritaði(Rókur í Jákupsstovu, formaður í SSF, blðm) hevur í dag sent viðfesta skriv til tey bæði sum eftir eru í starvsnevnd ÍSF, um støðuna í Ítróttasambandi Føroya, nú upp undir aðalfundin 20. mai 2016.

Til tykkum sum ikki vita hetta, so hava 13 sersambond valt at bevíst útíhýsa tey seinastu 3 frá tveimum felagsfundum, til at finna nýggja starvsnevnd, og sum vit skilja tað eisini til at avtala sínámillum, at vilja samtykkja nógv umrødda uppskotið til nýggjan býtislykil.

Vit trý annur sersambond frættu um hetta aftaná at fyrsti fundur hevði verið, men skiltu eisini skjótt at vit ikki váru ynskt á hesum fundum. Frættu at uppskot høvdu verið frammi til nýggja starvsnevnd, men fingu at vita at vit ikki kundu fáa at vita nøvnini, fyrr enn tey 13 høvdu havt sín næsta felagsfund, týskvøld sum uppskot til aðalfundin skuldi vera inni fríggjakvøld.

Og mikudag fingu vit so fráboðan frá teimum, at tey vildu velja Elina Heðinsdóttir Joensen til nýggjan forseta, og trý onnur av sínum í starvsnevndina. Og vit uttanfyri hava so sett tvey onnur uppskot fram, meðan eitt afturat er komið frá teimum, til tey fimm plássini sum við forsetanum eru í starvsnevnd ÍSF.

Nú fáa vit at síggja hvussu leikur fer, tá ið aðalfundurin verður, næsta fríggjadag. Men vit trý útifrystu hava sjálvsagt lítlar vónir, nú vit sum 'andstøða' ikki ein gang verða bjóðað á hesar fundir, sum koma at avgera nýggja ÍSF.

Hetta er tað sum tey trettan meina við, tá ið tey siga "demokrati". Og vit í SSF kunnu tí ikki annað enn at fyrihalda okkum til støðuna, og lodda dýpið í okkara egna felagsskapi, til at betur at kunna taka støðu til hvat vit skulu gera,

Um nakar ivast, so hava vit í Svimjisambandinum ongan traðulleika við at fara á fund við starvsnevnd ÍSF ella hvørjum øðrum felagsskapi sum vísti seg at vera eitt eitt av einum fundi.

Sjálvur fáa hverki eg ella næstformaðurin farið á aðalfund, við tað at hann er lagdur mitt meðan EM í svimjing er í London.

Við svimjikvøðu

Rókur